## Reglugerð fyri fíggjarlógarjáttan til bjargingarfeløg

**§ 1 Galdandi fyri**
Henda reglugerð er galdandi fyri útgjaldan av játtanum á Løgtingsins fíggjarlóg (kontonr.), stuðul til bjargingarfeløg.

**§ 2 Endamál**
Peningur úr hesi játtan er serliga ætlaður til bjargingarútgerð. Í serligum førum kunnu frávik gerast. Fiskimálaráðið tekur hesa avgerð!

**§ 3 Býtið**
30% av samlaðu játtanini kann útlutast beinleiðis til bjargingarfeløgini, sum fastur stuðul, hini 70% kunnu bert útgjaldast eftir umsókn, verkætlanarstuðul (sí §§ 6 og 7).
Ætlanin er bert at lata eitt útlutað gjald fyri hvørja sýslu. Í teimum førum, har serlig landafrøðilig ella felagslig viðurskifti eru galdandi, kann víkjast frá hesum. Fiskimálaráðið tekur hesa avgerð!

**§ 4 Treytir fyri stuðli**
Treytirnar fyri at eitt felag kann fáa av hesi játtan er, at felagið er virkið, og at latið verður inn:

- Aðalfundarfrágreiðing
- Grannskoðaður roknskapur
- Dagførdur fullfíggjaður alarmerings- og tilfeingislisti

Landsfelag fyri Bjargingarfeløg (LFB) stendur fyri innsavnan av hesum upplýsingum og sendir hesar samlaðar til Fiskimálaráðið. Í ivamálum tekur Fiskimálaráðið avgerð í málinum. LFB kann verða biðið um eitt fakligt viðmæli.

**§ 5 Árlig stevnumið**
Fiskimálaráðið kunnger árliga, í samráð við LFB, stevnumið fyri økið, ella slag av útgerð, ið serliga skal raðfestast.

**§ 6 Býtið av fasta stuðlinum**
Hesin parturin av játtanini verður býttur javnt millum tey feløg, ið sambært § 4 verða mett at vera virkin, og verður bert útgoldin móti skjalprógvan. LFB verður í hesum sambandi at rokna sum eitt felag, og fær fyri tænastur sínar, svarandi til tey støku feløgini. Í ivamálum tekur Fiskimálaráðið avgerð í málinum.

**§ 7 Býtið av verkætlanarstuðlinum**
Hesin stuðul er serliga ætlaður til keyp og viðlíkahald av bjargingarútgerð o.l. Feløg, ið søkja um hendan stuðul, skulu lata inn fullfíggjaða umsókn, viðhefta funktiónslýsing og kostnaðarætlan. LFB skal í hvørjum føri koma við einum fakligum viðmæli. Fiskimálaráðið avger, grundað á treytirnar nevndar í §§ 4 og 5, umframt viðmælinum, hvørjar umsóknir fáa stuðul.

**§ 8 Skjalprógvað nýtsla**
Nýtsla av stuðli, fingin av hesi játtan, skal skjalprógvast. Um útgoldin peningur ikki verður nýttur til játtaða endamálið, kann játtanin verða kravd afturgoldin.

**§ 9 Ognir keyptar fyri stuðul**
Ognir hjá bjargingarfeløgum, ið keyptar eru fyri hendan stuðul, skulu skrásetast í navni felagsins og kunnu ikki latast til annað endamál enn bjarging. Hesar ognir kunnu bert latast øðrum feløgum ella stovnum við góðkenning frá Fiskimálaráðnum.

**Tórshavn, tann 5. november 2002**

| | |
|---|---|
| **Jørgen Niclasen**<br>**landsstýrismaður** | **Kaj P. Mortensen**<br>**aðalstjóri** |